# Við Norðlýsinum til Stóru Dímun


*Norðlýsið skipar aftur í ár fyri einum siglingartúri til Stóru Dímun*

**Tiltiknu túrarnir til Stóru Dímun eru vorðnir ein fastur táttur av summarskránni hjá Norðlýsnum, og komandi sunnudag verður aftur skipað fyri einum túri til oynna**

ÚTFERÐIR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Norðlýsið hevur í fleiri ár skipað fyri teim tiltiknu túrunum til Stóru Dímun, og árið í ár verður einki undantak í so máta.

Sunnumorgunin klokkan 09.00 verður farið av Bursatanga, og siglt verður síðan til oynna við tí ríka fuglalívinum. Túrurin tekur væntandi um 10 tímar.

Siglt verður til Stóru Dímun, har fólk fáa møguleikan at fara á land, og síðani hyggja seg eitt sindur um á vøkru oynni.

Birgir Enni, samskipari av túrinum, greiðir frá, at fuglalívið úti á oynni er av tí besta um hesa tíðina, so allarhelst skuldi verið okkurt at hugt eftir.

Stórur áhugi plagar at vera fyri hesum túrunum, og so verður uttan iva eisini hesuferð.

Siglingartíðin aftur og fram tekur 6 tímar, og eru 4 tímar tískil til taks hjá fólki at njóta náttúruna úti á Stóru Dímun.

- Tey flestu taka matpakka við á ferðini, so hendan njóta vit øll saman uppi á oynni, greiðir Birgir frá.

Kostnaðurin fyri túrin er 350 krónir fyri hvønn, og tá ber eisini til at fáa suppu umborð.

Tilmelding fer frá hjá Birgir Enni á telefon 21 85 20.

# Smyril Line skipar fyri bussferð til Noregs

**Í summar verður høvi hjá føroyskum ferðafólki at kenna seg um kongar og drotningar, tá Smyril Line skipar fyri bussferð til Noregs, grannaland okkara fyri eystan**

BUSSFERÐ
*Ragnhild Ellingsgaard*

Hetta er aðru ferð, at Smyril Line skipar fyri hesum túri. Fyrri túrurin var seinasta summar, og tóku fólk so væl undir honum, at tey nú skipa fyri enn einum túri.


*Smyril Line lovar ferðafólki sínum eina kongaliga ferð í Noregi í summar*
*Mynd: Smyril Line*

Bussferðin fylgir somu leið, sum kongaligu gestirnir hjá norsku kongshjúnunum fylgdu á silvur-brúdleypsdegnum hjá hjúninum í 1993.

Á ferðini lovar Smyril Line at vísa  perlurnar í norsku náttúruni, umframt at ferðafólkini verða viðfarin á ein kongaligan hátt.

Túrurin byrjar tann 12. auguast , tá siglt verður til Noregs við Norrønu, og síðan byrjar sjálv bussferðin. Vitjað verður runt í landinum, og og gist verður á hotellum í Noregi.

Komið verður aftur til Føroyar tann 21. august klokkan 15.00

Ferðaleiðarin á túrinum er av norskari ætt, men tosar føroyskt.

# Føroya Sparikassi nýggjan leiðara


*Øssur Skeel Nolsøe verður frá 1. septembur nýggjur leiðari á Deild Tórshavn hjá Føroya Sparikassa*
*Mynd: Finnur Justinussen*

**Føroya Sparikassi hevur í dag sett Øssur Skeel Nolsøe sum nýggjan leiðara á Deild Tórshavn**

LEIÐARASKIFTI
*Ragnhild Ellingsgaard*

Øssur Skeel Nolsøe er 37 ára gamal, og skal avloysa Dánjal Joensen, sum hevur røkt leiðarastarvið seinastu tíðina. Dánjal fer nú í annað starv í Føroya Sparikassa.

Øssur hevur røkt starvið sum grannskoðanarleiðari, og heldur hann fram við hesum til tann 1. september, tá hann tekur við nýggja starvinum sum leiðari.

Deild Tórshavn fevnir um tær tríggjar privatkundadeildirnar í Sverrisgøtu, við Tinghúsvegin og í Hornabø.

Øssur byrjaði yrkið sítt í Føroya Sparikassa sum næmingur í 1981, og varð útbúgvin sparikassaassistentur í 1984. Síðan fór hann grannskoðaravegin, og hevur hann eitt stutt tíðarskifti eisini lisið í Danmark.

Í 1997 kom Øssur aftur til Føroya, har hann fyrst starvaðist eitt ár sum fulltrúi á kredittdeildini, og síðani sum grannskoðanarleiðari.

Sum grannskoðanarleiðari hevur Øssur eitt gott innlit í virksemi Sparikassans á øllum økjum, og harumframt var hann í juni mánaða liðugur við Finansiel Videreuddannelse.

Øssur tekur við nýggja starvinum tann 1. septembur í ár.



# Tobbi stendur við hvørt orð

**– Skuldsetingarnar ímóti Anfinni Kallsberg og Jørgeni Niclasen standa fult og heilt fyri mína rokning. Tær hava einki við Tjóðveldisflokkin at gera, sigur Tórbjørn Jacobsen**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Tórbjørn Jacobsen hevur nú fyri fyrstu ferð gjørt viðmerkingar til tað heitasta málið í føroyskum politikki í løtuni, har hann sjálvur hevur verið ein av høvuðspersónunum. Tað ger Tobbi í sínum egna blaði, Fregnum, fríggjadagin.

Tórbjørn Jacobsen hevði í farnu viku lesarabræv í Dimmalætting og Sosialinum, har hann millum annað førdi fram, at Anfinn Kallsberg og Jørgen Niclasen høvdu eina fortíð, har teir høvdu til við at skilja ímillum sítt egna og tað hjá øðrum.

Hesar skuldsetingar fingu ilt í Fólkafloksmenn, sum nú krevja at fáa at vita frá Tjóðveldisflokkinum, hvat liggur í skuldsetingunum.

Torbjørn Jacobsen slær í Fregnum fast, at hann stendur við hvørt einasta orð, sum hann segði í nógv umrødda lesarabrævinum.

– Eg hugsi, at tey flestu vita, hvat eg sipi til. Viðvíkjandi Jørgen Niclasen eru tað bara fá ár síðani, at tað var á hvørs mans varrum. Og hjá Anfinn snýr tað seg um nakrar løgnar flytingar, sum vóru duldar fyri teimum røttu viðkomandi, sigur Tórbjørn Jacobsen við Fregnir.

## Málini

Hetta er fyrstu ferð, at Tórbjørn Jacobsen sjálvur gevur ábendingar um, hvørji málini eru, sum hann hugsar um, tá hann heldur at teir báðir fólkafloksmenninir ikki dugdu at skilja ímíllum sítt egna og tað hjá øðrum.

Fyri Jørgen Niclasen hugsar Tobbi helst um málið, tá landsstýrismaðurin fyri Fólkaflokkin brúkti maskinu hjá Føroya Fiskavirking í Vágum, uttan at hava fingið loyvi til hetta frá leiðsluni í Fiskavirking. Hetta mál var frammi í fjølmiðlunum, men einki meira varð gjørt burturúr tí tá.

Tá talan er um løgmann, sipar Tobbi til eitt mál í Norðdepli fyri meira enn 20 árum síðani, tá Anfinn Kallsberg var bókhaldari hjá Frostvirkinum og tveimum skipum hjá partafeløgunum Samogn og Rivið. Í árunum millum 1977 og 1981 gjørdi Anfinn Kallsberg millumrokningar fyri eina slaka millión fyri at manningarnar á skipunum kundu fáa hýru.

Grannskoðarar komu í 1982 fram á hesar millumrokningar, og avtala varð gjørd millum partarnar um, at pengarnir skuldu gjaldast aftur.

## Fyri egna rokning

Tórbjørn Jacobsen sigur við Fregnir, at hansara viðmerkingar um landsstýrisfólkini hjá Fólkaflokkinum standa fyri hansara egnu rokning.

– Skuldsetingarnar standa fult og heilt fyri mína egnu rokning. Tær hava einki sum helst við Tjóðveldisflokkin at gera. Flokkurin hevur jú ongar fortreytir fyri at meina nakað um hetta. Tað, eg veit, kennir flokkurin sum flokkur einki til hesi málini, og tey eru ongantíð umrødd á floksfundi. Tað eri eg persónliga, sum havi gott innlit í hesi viðurskifti, tað eri eg persónliga, sum havi sett skuldsetingarnar fram, og tað eri eg persónliga, sum standi til ábyrgd fyri teimum, sigur Tórbjørn Jacobsen við Fregnir fríggjadagin.

– Um Anfinn Kallsberg vil hava tað til, at alt tað, sum eg skrivi, er Tjóðveldisfloksins ábyrgd, som má alt tað, sum Óli Breckmann sigur, eisini vera Fólkafloksins ábyrgd. Kortini er Anfinn merkiliga tigandi, hvørja ferð gallið hjá Óla verður borið út um landið, heldur Tobbi.


*– Eg kann undir ongum umstøðum liva við, at Fiskavirking skal avreiðast til ávísar fólkafloksmenn. Tað er tað, alt hetta málið snýr seg um, sigur Torbjørn Jacobsen um sítt stríð við Fólkaflokkin*

## Málið snýr seg um privatiseringina

Tað eru viðmerkingarnar um Anfinn Kallsberg og Jørgen Niclasen, sum hava fingið mestu umrøðuna í fjølmiðlunum farnu vikuna, men Tórbjørn Jacobsen heldur, at tað er ikki hetta, sum málið veruliga snýr seg um.

– Høvuðsmálið er jú vinnupolitikkurin. Eg havi sagt, at eg ikki kann góðtaka tað, sum hendir í Vinnumálastýrinum í løtuni, men tað hevur Fólkaflokkurin onga viðmerking til, sigur Tobbi við Fregnir.

– Eg kann undir ongum umstøðum liva við, at Fiskavirking skal avreiðast til ávísar fólkafloksmenn. Tað er tað, alt hetta málið snýr seg um. Tað, Anfinn og Jørgen hava gjørt, er sín sak. Tað er fortíð. Tað er tað, sum Bjarni Djurholm er í ferð við at gera, sum er tað álvarsama málið. Tað snýr seg um framtíðina.

Tórbjørn Jacobsen heldur, at tað tænir ongum endamálið, um Anfinn Kallsberg ella Jørgen Niclasen stevna honum fyri ærumeiðing, og um eitt nú løgmaður velir at stevna, so er tað hansara trupulleiki, heldur Tórbjørn Jacobsen.

# Fólkaflokkurin setir tíðarfreist


*Anfinn Kallsberg og Óli Breckmann hava skrivað undir brævið, sum nú er sent Tjóðveldisflokkinum*

**Fólkaflokkurin vil hava at vita frá Tjóðveldisflokkinum, um allir tingmenninir hjá flokkinum framvegis stuðla samgonuni. Og Fólkaflokkurin vil hava svar í seinasta lagi sunnudagin**

POLITIKKUR
*Eyðun Klakstein*

Fólkaflokkurin hevur nú sent skriv til Tjóðveldisflokkin fyri at fáa at vita, um flokkurin framvegis stuðlar samgonguni, og flokkurin vil eisini hava at vita, um Tjóðveldisflokkurin tekur undir við skrivingini hjá Tórbirni Jacobsen.

Tað gjørdist greitt á innanhýsisfundi í Fólkaflokkinum týskvøldið, at flokkurin fór at krevja hesi svar frá størsta flokkinum í samgonguni.

Tað er nú stívliga ein vika, til Anfinn Kallsberg skal halda løgmansrøðuna, og við ótryggu politisku støðuni, hevur Fólkaflokkurin sett eina tíðarfreist fyri, nær Tjóðveldisflokkurin kann svara. Fólkaflokkurin vil hava svar í seinasta lagi sunnudagin.

## Fara at svara

Fólkaflokkurin vil hava at vita, um allir tingmenninir hjá Tjóðveldisflokkinum framvegis taka undir við samgonguskjalinum og stuðla samgonguni.

Høgni Hoydal segði í gjár við Sosialin, at fær Tjóðveldisflokkurin skriv frá Fólkaflokkinum, so fara tey at svara skrivinum. Hann slóð fast, at Tjóðveldisflokkurin stuðlar samgonguni, men at flokkurin ikki blandast upp í skrivingina hjá Tórbirni Jacobsen, sum má standa fyri hansara egnu rokning.